





# Jóansøkan í Vági 2004

Vælkomin til Jóansøkuhald í Vági, sum verður hildið í døgunum 26. og 27. juni.

Fyrsta Jóansøkan var hildin í Vági í 1926, eins og tíðirnar broytast, ja so eru stevnurnar eisini broyttar til nútíðina, tó eru stevnurnar nú, eins og fyrr bygdar upp og fáa virði við teimum mongu ítróttar- og mentanartiltøkum, sum okkara ungdómar og fólk annars skipa fyri á stevnunum runt landið.

Jóansøkan hevur stóran týdning fyri fólkið á staðnum, tað hendir nógv, tað verður fríðka um og hond tikin í ymiskt, sum hevur ligið á láni.

Vágur hevur góðar møguleikar at skipa fyri stevnu, her eru nógv mentanarhús, tað veri seg til enskan/ føroyskan dans, sjónleik, kórsang, ítrótt, fundir, møtir, framsýningar o.a.m..

Stevnurnar savna fólk til at hugna sær, hetta gevur høvi til at heilsa uppá fólk, sum ein annars ikki sær til dagligt.

Oftast eru nógv fólk til ymisku ítróttartiltøkini, t.d. kappróður, o.a. mangt, sum ymsu feløgini standa fyri, eisini verður skipað fyri Tivoli, sangløtum, framsýningum, røðum, ja mangt verður at fara til.

Tær ymsu pisurnar hava fingið húgvuna á høvdið, tær prýða um á gøtunum slíkar stevnudagar, vit ynskja teimum tillukku og eina góða framtíð.

Stevnurnar eru góðar fyri at glaða sálina, at leggja dagligdagin eitt sindur til viks og geva sær tíð at liva, tað at geva sær tíð at liva, ja tað er vorðin ein trupulleiki í nútíðarsamfelagnum, oftani er orsøkin tann, at vit seta so stór krøv til okkum sjálvi, ja, oftani alt ov stór krøv, vit eru bert menniskju og eiga ikki at gloyma tað, lívið skal livast, her er eitt høvi, vit vitja stevnurnar, tær hava nakað fyri øll.

Veðrið hevur stóran týdning fyri stevnuhaldið, er tað gott, so er alt gott, og sjálvt um vit einki fáa gjørt við tað, so fara vit at vóna at veðrið verður gott.

Vil hervið, býráðsins vegna, takka tykkum mongu sum skipa fyri



stevnuhaldinum, tað er eitt stórt arbeiði, sum verður lagt í tað, bæði av kvinnum og monnum.

Góðu stevnufólk, ítróttarfólk og gestir annars, vil ynskja tykkum hjartaliga vælkomin til Vágs at halda Jóansøkuna 2004.

**Jógvan Krosslá**
**borgarstjóri**

# Guðrum Sólja í Pakkhúsinum

**Stjørnan vitjar aftur á klettarnar og Guðrun Sólja Jacobsen fer at framføra í Stóra Pakkhúsi á jóansøku, júst sum hon gjørdi fyri tveimum árum síðni,tá hon bert var ein vanligur sangfuglur av Tvøroyri**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.f*

Fyri tveimum árum síðani hugtók ein sangfuglur av Tvøroyri. Tað var jóansøka í Vági og tónleikacafé í Stóra Pakkhúsi.

Síðani er føroysk tónleikasøga skrivað, Guðrun Sólja Jacobsen er ikki bert ein vanligur sangfuglur, men føroyska gentan, sum vann kappingina hjá DR, Stjerne for en aften. Og eisini vann hon hjørtuni hjá flestu føroyingum og eisini hjá dønum.

Quiet Storm kallaðist fløgan, sum kom út í kjalarvørrinum av kappingini. Og



*Guðrun Sólja Jacobsen: Sangfuglur vitjar aftur, tí fyri tveimum árum síðani stóð hon á palli í Stóra Pakkhúsi, ikki so kend sum nú, men aftur í ár verður hon við jóansøku í Pakkhúsinum*

*Mynd:D.Olsen*

nú hevur stormurin lagt seg eitt sindur og Guðrun stórtrívist í Danmark.

Hon arbeiðir miðvíst við at geva enn eina fløgu út. Eina fløgu, har hon sjálv er meira við. Og enn hevur hon tilboð og er úti og syngur kring í danska landslagnum. Og síðani hon vann kappingina hjá DR hevur hon veruliga roynt seg, tí henni hevur staðið í boði at syngja við teim stóru á palli og tað hevur hon eisini gjørt, m.a. Stig Rossen og Sanne Salomonsen.

Men nú er jóansøka fyri framman og Guðrun verður aftur í Pakkhúsinum á tónleikacafé. Sangfuglurin vitjar aftur og tað eru tað óivað mong, ið fegnast um.




